
Nakrar viðmerkingar og talvur frá Ólavi Poulsen til Fíggjarnevndina.

Vegna brot í Teams fundarsamskiftinum, vil eg endurtaka:


El-framleiðsla, við smáum vatnmyllum:



Smáu vatnmyllurnar framleiða støðugt gjøgnum árið. Uml. 60-80% av tí møguliga.

Lítil/eingin munur eftir árstíðini, og eingin munur, heilt støðugt, gjøgnum samdøgrið/vikuna.

Grøni vøksturin í grannalondunum, síðan 2004:



Tíverri eingi hagtøl og eingin grønur vøkstur fyri Føroyar síðan 2014

Vegna brot í Teams-fundarsamskiftinum, vil eg endurtaka:

1: MVG-lógin fyri el-bilar og hitapumpur eigur at halda áfram óbroytt, (2 ár í senn).
Núverandi lóg vísir politiska viljan – hybrid er als ikki grønur og plug-in hybrid er lítið grønur.

2: Smáar vatnmyllur eiga at verða frítiknar fyri mvg.


3. Umhvørvisstovan og SEV eiga at finna og áseta prísin fyri streym frá smáu vatnmyllunum.

4. Smáu vatnmyllurnar framleiða grønan streym, støðugan streym alt samdøgrið, smáu vatnmyllurnar hava sera langa livitíð. Tær kosta millum ¼ og 1 mió. og spara seg inn eftir 4-10 árum.

5. Loyvi til smáar vatnmyllur skal útvegast frá: Umhvørvisstovuni (Vernd og Orka), Náttúrufriðingarnevndini, Kommununi, Hagaeigara ella Búnaðarstovuni/festara og SEV um íbinding.

6. Tað er avgerandi at smáu vatnmyllurnar verða bundnar í el-netið so avlopsorkan kemur til høldar og verður gagnnýtt. Streymurin fer fyrst til egna nýtslu og avlopið fer á netið og gagnar øllum. Tann parturin sum SEV missir í mistari sølu, er sera lítil í mun til vinningin ið SEV fær av keyptu avlopsorkuni. Harvið økist parturin av grønari orku í Føroyum og oljuinnflutningurin minkar.

7. Føroyar standa fyri stórum avbjóðingum á orkuøkinum, og stóran týdning hevur at rættar avgerðir verða tiknar. Persónliga meti eg at størsta týdning hevur at styrkja SEV.



Eydnuberandi 2021 ynskja vit

VatnOrka
tel 230 050


Takk fyri! - *tit eru vælkomin at síggja og hoyra meira.*

Ólavur Poulsen 14.jan.2021

Nakrar viðmerkingar og talvur frá Ólavi Poulsen til Fíggjarnevndina.

Vegna brot í Teams fundarsamskiftinum, vil eg endurtaka:


El-framleiðsla, við smáum vatnmyllum:



Smáu vatnmyllurnar framleiða støðugt gjøgnum árið. Uml. 60-80% av tí møguliga.

Lítil/eingin munur eftir árstíðini, og eingin munur, heilt støðugt, gjøgnum samdøgrið/vikuna.

Grøni vøksturin í grannalondunum, síðan 2004:



Tíverri eingi hagtøl og eingin grønur vøkstur fyri Føroyar síðan 2014

Vegna brot í Teams-fundarsamskiftinum, vil eg endurtaka:

1: MVG-lógin fyri el-bilar og hitapumpur eigur at halda áfram óbroytt, (2 ár í senn).
Núverandi lóg vísir politiska viljan – hybrid er als ikki grønur og plug-in hybrid er lítið grønur.

2: Smáar vatnmyllur eiga at verða frítiknar fyri mvg.


3. Umhvørvisstovan og SEV eiga at finna og áseta prísin fyri streym frá smáu vatnmyllunum.

4. Smáu vatnmyllurnar framleiða grønan streym, støðugan streym alt samdøgrið, smáu vatnmyllurnar hava sera langa livitíð. Tær kosta millum ¼ og 1 mió. og spara seg inn eftir 4-10 árum.

5. Loyvi til smáar vatnmyllur skal útvegast frá: Umhvørvisstovuni (Vernd og Orka), Náttúrufriðingarnevndini, Kommununi, Hagaeigara ella Búnaðarstovuni/festara og SEV um íbinding.

6. Tað er avgerandi at smáu vatnmyllurnar verða bundnar í el-netið so avlopsorkan kemur til høldar og verður gagnnýtt. Streymurin fer fyrst til egna nýtslu og avlopið fer á netið og gagnar øllum. Tann parturin sum SEV missir í mistari sølu, er sera lítil í mun til vinningin ið SEV fær av keyptu avlopsorkuni. Harvið økist parturin av grønari orku í Føroyum og oljuinnflutningurin minkar.

7. Føroyar standa fyri stórum avbjóðingum á orkuøkinum, og stóran týdning hevur at rættar avgerðir verða tiknar. Persónliga meti eg at størsta týdning hevur at styrkja SEV.



Eydnuberandi 2021 ynskja vit

VatnOrka
tel 230 050

Takk fyri! - *tit eru vælkomin at síggja og hoyra meira.*

Ólavur Poulsen 14.jan.2021